Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Føroya Sílaveiðifelag og alistøðin hjá P/F Fiskaaling við Áir

Spurningar:

1. Nær móttók Fiskaaling umsókn frá Sílaveiðifelagnum um leigu av parti av hølunum hjá Fiskaaling við Áir?
2. Nær fær Føroya Sílaveiðifelagið eitt svar upp á umsóknina um at leiga ein part av hølunum hjá Fiskaaling við Áir til at reka sítt virksemi?
3. Hví hevur tað drigið út at geva Sílaveiðifelagnum eitt svar?

Viðmerkingar:

Síluveiðifelagið hevur søkt Fiskaaling um at reka sítt virksemi í einum parti av hølunum hjá Fiskaaling við Áir. Felagið hevur enn onki svar fingið.

Alistøðin (smoltstøð) hjá P/F Fiskaaling við Áir er ein sokallað feskvatns-alistøð, har dentur verður lagdur á teoretiska gransking um t.d. lús o.a. sum hevur við alivirksemi at gera.

Sílaveiðifelagið hevur m.a. sum endamál at vísa vegin fyri síla- og laksaaling.

Vit kunnu staðfesta eina afturgongd av síla- og laksastovninum. Villlaksur hevur nakrar serligar ílegur og stammur; arvur sum gongur aftur í somu áum – og laksur sloppin út í alibrúkunum kann hava við sær tær avleiðingar, at bland kemur í ílegurnar, og røttu arvaeginleikarnar detta tá burtur.

Sílaveiðifelagið kann hava stýr á kleking, og at besti laksurin og sílini verða sett út í okkara áir - ætlað til vanligan laksa- og sílafiskiskap. Eisini kann arbeiðið hjá felagnum virka fyri at fremja frítíðarfiskarí ella turistfiskarí og harvið menna okkara ferðavinnu. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 13. september 2023

Johan Dahl